SETEPLIR & HANDILSTØÐ

MBM

Fóður | Vegurin Langi | 188 Hoyvík
Tel. 309037 | Fax 309001
www.mbm.fo



| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| MBM Fóður Klaksvíkar Timburhandil Tel. 457249 | P/F Niðri á Møl Skálavík Tel. 361231 | MBM Fóður Søldarfjørður Tel. 441898 ella 218770 | P/F Magnussen Miðvágur Tel. 333417 | MBM Fóður Drelnes Tel. 372454 | Kirkjuteig Sandur Tel. 361072 |

Grafik Studio 318283



STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til vegadeildina

**Við hesum verður søkt eftir verkfrøðingi til vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast. Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:

- Planlegging
- Programmeringar, forkanningar, prosjektgransking av vega- og tunnils-prosjektum
- Eftirlit við verkætlanum
- Gera ætlanir fyri ferðslutrygdartiltøk
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving við royndum ella áhuga innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki, kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

Viðkomandi skal eisini kunna røkja aðrar uppgávur á stovninum, enn tær omanfyri nevndu.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:

Landsverk
Postboks 78
110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2006. Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Heina Eysturoy, leiðara á vegadeildini, fartel 540 881, teldupostur he@lv.fo.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land


# Bitland stovnað KT-felag



## Menna og reka sporførisskipan

KUNNINGARTØKNI

Hugvekjandi samstarv millum vinnu og myndugleikar er nú úrslitað í einum KT-felag, sum Bitland hevur verið við til at loysa úr lagdi.

Ráfiskaseljarafelagið og Ráfiskakeyparafelagið hava í dag stovnað eitt partafelag, sum hevur til endamáls at menna eitt talgilt undirstøðikervi til sporførar skrásetingar frá fiskivinnuni í Føroyum. Somuleiðis er ætlanin, at skipanin skal seljast uttanlands.

Felagið er eitt úrslit av samstarvi millum vinnufeløgini, Fiskimálaráðið og Bitland. Ráfiskakeypara- og seljarafelagið eiga hvør sína helvt av partapeningi-num, sum er 500.000 kr.

Bitland hevur, við sera góðum stuðli frá Menningarstovuni, fyrireikað eina sporførisskipan síðani á heysti 2003. Fyrsti partur av arbeiðnum var at gera eina undanverkætlan, sum síðani varð nýtt sum grundarlag til kravfestingararbeiðið, sum varð latið úr hondum í november 2005. Menningarstovan hevur latið fólk til verkætlanarleiðslu síðan byrjan.

Kravfestingararbeiðið til fyrsta part varð bjóðað út í november og 2 føroysk KT feløg sendu inn tilboð uppá at gera fyrsta part av sporførisskipanini.

Komandi hálvár verður fyrsti parturin av sporførisskipanini mentur, og ætlandi verður skipanin royndarkoyrd í heyst.

Í nevndini fyri partafelagið "Føroya Sporførisskipan" sita Marita Rasmussen fyri Ráfiskakeyparafelagið -forkvinna, Johannus Olsen fyri Ráfiskaseljarafelagið umframt Steinbjørn í Dali. Nevndin hevur sett Steinbjørn í Dali sum stjóra í felagnum.

Hetta er fyrsta felag, sum beinleiðis er sprottið úr eini Bitland verkætlan. Bitland hevur sett sær fyri, at árliga skulu millum eitt og trý slík nýskapandi feløg stovnast sum úrslit av teim verkætlanum, ið arbeitt verður við í Bitland høpi.


**Krambúðin hjá Verkstaðnum Vón**

**er á tremur við páskalutum.**

Eisini eru bestikkmappur og grillhandskar aftur at fáa.



**Krambúðin er opin:**
Mánadag - fríggjadag
kl. 8.30 - 15.30
Stongt er í páskavikuni

**Øll eru vælkomin**

**Verkstaðið Vón** · Hóvabrekka 1 - Argir